## Danmark stórt hall

Fíggjarlógaruppskotið hjá donsku stjórnini fyri 2010 vísir, at frá stórum avlopi í ár fer Danmark til enn stórt hall næsta ár. Fyri nøkrum mánaðum síðani segði Claus Hjort Frederiksen, fíggjarmálaráðharri, at hallið á donsku fíggjarlógini fyri 2010 fór at verða um 60 milliardir krónur ímóti 60 milliardum krónum í avlopi í ár. Men í uppskotinum, sum ráðharrin legði fram í dag, er hallið 85 milliardir krónur, sum er tað mesta tey seinastu 25 árini. Sosialdemokratarnir halda kortini, at hallið eigur at vera uppaftur størri. Teir vilja brúka 35 milliardir krónur afturat til ein vakstrarpakka, so hallið kemur upp á 120 milliardir krónur.



## Veðurlagsbumba

Veðurlagsgranskararnir Eystein Jansen og Helge Drange, sum arbeiða á lærda háskúlanum í Bergen, koma nú við tí, sum fleiri kalla eina veðurlagsbumbu. Teir báðir vilja vera við, at mongdin av $CO_2$ í atmosferuni kann vera millum 20 og 25 prosent størri, enn vísindin higartil hevur hildið. Orsøkin er, at náttúran megnar ikki at taka so nógv vakstrarhúsgass sum fyrr. Teir báðir professararnir siga, at tað er ikki óhugsandi at ímynda sær, at hitin á jørðini fer at veksa fýra stig, og at altjóða samfelagið má leggja seg eftir at skerja $CO_2$-útlátið heili 85 prosent innan 2050.

# Matfestivalurin ein drønandi succés













**Við fleiri túsund glaðum vitjandi og einum hugnaligum umhvørvi, har spælt var á allar sansir, kann Matfestivalurin valla kallast annað enn ein drønandi succes**

MATFESTIVALUR

*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tórshavnar Matfestivalur var um vikuskiftið, og í eftirmetingini av festivalinum er fyriskiparin Mortan í Hamrabyrgi sera væl nøgdur við, hvussu alt spældi av.

- Hetta var ætlað sum ein generalprøvi, har eg var fyrireikaður upp á at tað fór at vera eitt lítið nell, og so var tað tað, men tað vísti seg at vera ovurstórur áhugi fyri einum slíkum festivali, sigur Mortan í Hamrabyrgi.

Eftir tallerkum og pinnum, ið vóru borðreiddir, vóru væl omanfyri 1000 vitjandi, upp móti 3 til 4000 roknar Mortan í Hamrabyrgi við.

### Hevur tænt sínum endamáli

Endamálið við at skipa fyri hesum festivalinum var at lata eyguni hjá føroyingum og hjá myndugleikunum fyri fyrst og fremst hvørjir møguleikar liggja í føroyskum mati, og harafturat at varpa ljós á tær umstøður, ið matstovur í Føroyum hava at virka undir dagliga – nakað, ið Mortan í Hamrabyrgi kallar alt annað enn gott.

- Hetta var ætlað sum ein eye-opener hjá føroyingum og politikarum, soleiðis at møguleikarnir og trupulleikarnir í matvinnuni kundu koma fram í ljósið. Sigast má, festivalurin hevur tænt sínum endamáli, greiðir Mortan í Hamrabyrgi frá.

Hann vísir eitt nú á, at karmarnir, sum matvinnan í Føroyum hevur at virka undir, eru alt annað enn nøktandi. Krøvini til framleiðslu av mati gera, at matstovurnar ikki hava møguleika fyri at útnytta tann føroyska kovan til fulnar.

- Her kundu politikararnir kanska fáa at síggja, um teir í veruleikanum eru samdir við tí, ið lógin ásetur av krøvum, vísir Mortan í Hamrabyrgi á.

### Frítt spæl

Tey, ið vístu mat fram á Matfestivalinum, fingu so at siga frítt spæl. Alt lat seg gera, og nógv nýtt var at síggja, eins og nógvur matur, ið fólk kanska bara minnast frá fyrr av.

Tó gav Mortan í Hamrabyrgi eisini kokkunum eina uppgávu, nevniliga at roykja mat við torvi.

- Kokkarnir fingu ta uppgávu, at roykja við torvi, bæði fisk og kjøt. Hetta, sum verður torvroykt, fær ein serligan smakk. Aðrastaðni hava tey við at roykja matin við, men tað hava vit ikki í Føroyum. Men eg fekk torv frá einum bónda, sum vit fingu brúkt sum smakkgevara. Hetta er ikki roynt áður, men vísti seg at virka væl, greiðir Mortan í Hamrabyrgi frá.

### Aftur næsta ár

Nú festivalurin er farin afturum, fara fyrireikararnir at seta seg niður at eftirmeta.

- Tankin er at tað skal vera afturvendandi tiltak. Hetta skuldi vera ein generalprøvi, at lodda dýpið fyri hvat fólk tíma og vilja. Óansæð hvussu tað gekk, so hevur man nakrar praktiskar royndir. Til næsta ár rokni eg við at tað kanska fær ein annan form, og at tað verður finpussað. Nú hava vit loddað dýpið, og sóu at áhugi er til staðar, og at grundarlag er fyri slíkum festivalum í Føroyum, sigur Mortan í Hamrabyrgi.